Vikublaðið Sosialurin



## Jón Ásgeir farin frá

Tann kendi íslendski fíggjarmaðurin Jón Ásgeir Jóhannesson hevur gjørt av at fara frá sum formaður og nevndarlimur í Magasin. Tað skrivar Børsen. Blaðið skrivaði herfyri, at bretski ríkmaðurin Sir Philip Green ætlaði sær at keypa Magasin og Illum frá íslendsku eigarunum, men enn er ikki greitt, hvussu verður við tí. Nýggju nevndarlimur í Magasin fyri Jón Ásgeir Jóhannesson er aðalstjórin í Baugur Group, Gunnar Sigurðsson. Baugur hevur átt Magasin og Illum saman við øðrum síðani 2004.



*Jón Ásgeir Jóhannesson (Mynd: Morgunblaðið)*

## Tvey leitiloyvi á Hvarvinum

Bretska oljufelagið Cairn Energy PLC og tað grønlendska oljufelagið NUNAOIL A/S hava fingið tvey leitiloyvi afturat á leiðini úti fyri Hvarvinum. Talan er um eina leið sunnan fyri 60 stig, og í vídd er leiðin meiri enn 20.000 ferkilometrar. Tey bæði feløgini hava fingið einarætt til at leita eftir olju og gassi og einarætt til møguliga framleiðslu á leiðini, sigur KNR. Cairn Energy PLC eitt eitt olju- og gassfelag, sum hevur høvuðssæti í skotska býnum Edinburgh. Felagið er skrásett á virðisbrævamarknaðinum í London.

# Lat okkum geva íslendingum tær 300 miljónirnar

**– Tey, sum hava fingið hugskotið at lata íslendingum 300 miljónir krónur, eiga miklan heiður fyri tað. Eg haldi tó avgjørt, at føroyingar eiga at geva íslendingum hendan pengin fyri einki. Í mong ár hava vit fingið fiskirættindi í íslendskum sjógvi fyri einki – rættindi, sum hava havt og framvegis hava stóran týdning fyri okkara línuskipaflota, sigur Johan Mortensen, vinnulívsmaður**

BRÓÐURHOND
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vinnulívsmaðurin Johan Mortensen vísir á, at tað er okkum føroyingum sum so líka mikið, hví Ísland er komið í ta fíggjarligu kreppu, sum landið er í.

- Sjálvandi kunnu vit brúka hetta til okkurt, tí øll kunnu læra av mistøkum hjá hvørjum øðrum. Hjá okkum gekk eisini heilt galið fyrst í nítiárunum, og Føroyar komu í eina stóra kreppu. Vit fótaðu okkum aftur, og eg ivist onga løtu í, at íslendingar sum tjóð eisini fara at fóta sær aftur. Teir hava skapt stór virðir – ikki bara í Íslandi, men kring um heimin, og einki er at ivast í, at nógv fer at liggja eftir, sum ongan veg kann fara, tá fíggjarkreppan hasar av aftur.

### Stórlætni

Hann vísir á, at sjálvandi eru 300 miljónir krónur nógvur peningur í okkara verð.

– Men eingin ivi er um, at vit nú eiga at rætta grannunum okkara fyri vestan eina útrætta hond og geva teimum hendan peningin.

Johan Mortensen sigur, at íslendingar ongantíð hava verið smáligir, tá ræður um "lítlabeiggjan" Føroyar, sum hann tekur til.

– Ígjøgnum mong ár hava teir víst okkum stórlætni sum einasta tjóð í heiminum at lata okkum fiska botnfisk í teirra sjógvi – fyri at kalla einki. Sjálvt, tá teir hava verið noyddir at skerja sínar egnu kvotur eftir fiskifrøðiligari tilráðing, hava teir altíð tikið fyrilit og hava hugsað um føroyingar.

Hann vísir á, at undan seinastu samráðingum millum londini noyddust íslendingar at skerja sína egnu toskakvotu úr 130.000 niður í 90.000 tons, men kortini varðveittu føroyingar meginpartin av síni botnfiskakvotu í íslendskum sjógvi.

– Soleiðis hevur verið á hvørjum ári í mong Harrans ár. Íslendingar hava altíð átt pláss fyri at rætt føroyingum bróðurhond, og tað eiga vit eisini at gera, nú teirra land er í ringastu fíggjarkreppu nakrantíð.

Johan sigur, at bondini og samstarvið millum londini eigur at siga okkum, at eingin orsøk er hjá føroyingum at ivast í at rætta íslendingum eina hond, nú íslendska fólkið og tjóðin eru í svárari kreppu.

### Ein miljard

- Eg havi skilt á monnum, sum eitt nú reka línuskipini, at botnfiskakvotan hjá okkum í íslendskum sjógvi er týðandi partur av teirra grundarlagið, og umborð á føroysku línuskipunum eru nógvir mans.

Vinnulívsmaðurin sigur seg hava skilt, at henda kvota í fyrtahondsvirði – ella avreiðingarvirði - er verd einar 70 miljónir krónur í okkara peningi, og harafturat koma so allir ringvirkningarnir, sum hetta tilfeingið skapar kring um í føroyska samfelagnum.

– Hetta merkir, at vit bara seinastu 10 árini hava fingið fiskirættindi í íslendskum sjógvi, sum eru verd nógv meira enn eina miljard, og tað er so sanniliga eisini nógvur peningur í okkara verð.

Johan vísir á, at tað er ikki fyrr enn seinnu árini, at botnfiskakvotan í íslendskum sjógvi er uppvigað eitt lítið sindur í uppisjóvarfiski í føroyskum sjógvi.

– Okkara línufloti er ikki best fyri í løtuni, og trupult hevur verið at mannað skipini. Ikki minst í tíðum sum hesum hevur kvotan í íslendskum sjógvi havt veldduga stóran týdning. Skipini hava gjørt nakrar góðar túrar á hvørjum ári, sum veruliga hava stuðlað undir inntøkugrundarlagið hjá bæði reiðaríum og manningum, leggur hann aftrat.

### Einki reyp

Hann heldur ikki, at vit eiga at gera so nógv burtur úr, at vit lata íslendingum henda peningin, tí íslendingar hava ongantíð breggjað sær av, at teir hava latið okkum ókeypis veiðirættindi.

– Hetta er nakað, sum teir bara hava gjørt, og vit hava ongantíð upplivað, at teir breggja sær av hesum, hvørki í Íslandi og enn minni úti í heimi. Tí eiga vit ikki at válka okkum í hesum, sum vit seinastu dagarnar hava verið vitni til í Føroyum, sigur Johan Mortensen, vinnulívsmaður, sum avgjørt heldur, at Føroyar nú eiga at lata íslendingum hesar 300 miljónirnar fyri einki – og uttan eftirrokning á nakran hátt.



*- Bara seinastu 10 árini hava vit fingið fiskirættindi í íslendskum sjógvi, sum er verd nógv meira enn eina miljard krónur í okkara peningi. Hetta er nakað, sum íslendingar bara hava givið okkum, og vit hava ongantíð upplivað, at teir breggja sær av hesum, hvørki í Íslandi og enn minni úti í heimi. Tí eiga vit ikki at válka okkum í, at vit nú rætta teimum eina hond, sigur Johan Mortensen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

